# Vøruvognstilboð



## Nissan Terano 3,0 van

**Árgangur** ......................... juni 2002
**Koyrt (km)** ........................... 78.000
**Prísur** ...................... 149.000 v/mvg

Rustviðgjørdur. Eyka felgur og dekk. Setrini fylgja við.



## Mazda Premacy 1,8 van

**Árgangur** ............... september 2002
**Koyrt (km)** ........................... 75.000
**Prísur** ........................ 95.000 v/mvg

Í sera góðum standi. Rustviðgjørdur. Eyka dekk og felgur fylgja við bilinum.



## Hyundai CRDi 140hk

**Árgangur** ................ november 2006
**Koyrt (km)** ........................... 42.000
**Prísur** ...................... 178.000 v/mvg

**nordcar**

Smiðjugerði 4 · 100 Tórshavn · Tel 30 80 80
nordcar@nordcar.fo · www.nordcar.fo

SANDAVÁGS KOMMUNA

# KUNNGERÐ

## um framløgu av broytingum í byggisamtykt og bygdaplani fyri Sandavágs kommunu.

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 við seinri broytingum, hevur kommunustýrið á fundi tann 28. desember. 2007, samtykt at gera broytingar í byggisamtykt og bygdaplani fyri Sandavágs kommunu.

Broytingarnar, sum eru galdandi fyri alla kommununa, fevna í høvuðsheitum um:

Sethúsaøkið við Giljatrøðna verður víðkað norður til Gáansá.

Sethúsaøkið undir Nesavegnum verður broytt til alment øki.

Sethúsaøkið við Stóraklett verður víðkað.

Sethúsaøkið uppi í Brekkum verður víðkað til eisini at umfata partar av:

Matr.nr. 275a, 133a, 134a, 143a, 16a, 198a, 257a og 92a.

Nýtt sethúsaøkið Úti á Trøð, sum umfatar partar av:

Matr. nr. 275a, 62d, 62b og 151.

Sethúsaøkið undir traðarvegnum Út á Trøð verður víðkað.

Partur av hesum økjum vera broytt til byggiøki við lokaláseting:

Matr. nr. 133a, 237a, 235, 4a, 211a, 223a, 275a, 134a, 209a, 133a, 116a, 74c, 95c, 97a, 285d og 152.

Økið F, við fótbóltsvøllin verður víðkað.

Vinnuøkið við grótbrotið verður broytt til økið F, alment frítíðarøki.

Summarhúsøkið á Giljanesi verður víðkað til eisini at umfata partar av:

matr.nr. 219l, 258a, 268 og 269.

Almenna byggisamtyktin, saman við korti og vegleiðing um kæru, liggur frammi til almenna eftirskoðan á kommunuskrivstovuni í tíðarskeiðinum frá 6. februar. til 6. mars 2008

Sama tilfar er eisini á heimasíðuni: www.sandavagur.fo

Mótmæli og broytingaruppskot skulu vera kommunustýrinum í hendi seinast 3 mánaðir eftir kunngerðardegnum.

**Sandavágs Kommuna**
www.sandavagur.fo

Hammershaimbsvegur 1 · FO-360 Sandavágur
Tel. +298 332 470 · Fax. +298 333 470
sandavagur@sandavagur.fo

# Telefonfólk søkist

Søkt verður eftir einum fyrikomandi fólki at arbeiða sum telefonumstillari og annað fyrifallandi arbeiði, at byrja skjótast gjørligt.

Arbeiði er í skiftandi vaktum.

**Bill. mrk. 230108-002**

# Sløkkiliðsfólk

## til Leirvíkar Sløkkilið

Søkt verður eftir áhugaðum fólki, manni ella kvinnu, at taka við starvi í Leirvíkar Sløkkiliði.

Starvið er at rokna sum sjálvboðin tænasta, tó við ávísum setanartreytum og við samsýning eftir nærri avtalu.

Roknað verður við, at møguligur umsøkjari hevur fastan bústað í bygdini og hevur starv á landi (er heimafólk).

Øll eru vælkomin at søkja, eisini starvsfólk hjá kommununi. Fyrimunur er, at umsøkjarin hevur stóra koyrikortið, handaliga útbúgving, men er ikki ein treyt.

Tey, ið søkja og verða sett á liðið, mugu rokna við, at skula takað skeið í sløkkiliðsútbúgving og kunna leggja fram eina heilsuváttan til tílíkt virksemi.

Nærri upplýsingar um starvið, fortreytir o.a. fáast við at venda sær til Leirvíkar Kommunu, tlf. 443006 ella brunaumsjónarmannin,tlf. 216323.

Umsóknin skal verða Leirvíkar Kommunu í hendi í seinasta lagi mikudagin 20.februar 2008 kl.12.00.

**Leirvíkar Kommuna**
Postboks 42 · 520 Leirvik

**Leirvíkar sløkkilið** hevur nýmótans sløkkiútgerð og hevur verið virkið í nógv ár við manning, ið hevur verið til reiðar nátt sum dag, og veitt hjálp, har hon hevur tørvað. 8 mans eru í sløkkiliðnum. Eins og bygdin sjálv, eru uppgávurnar hjá sløkkiliðinum í menning og liggja tí spennandi uppgávur fyri framman. Sløkkiliðssamstarv er við grannakommunurnar. Leirvíkar Sløkkilið verður dagliga fyrisitið av brunaumsjón-armanninum.

# Kunngerð

**um framløgu av broytingaruppskoti í býarskipanini og byggisamtyktini fyri Leirvíkar Kommunu.**

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 við seinri broytingum hevur kommunustýrið á fundi tann 17. desembur 2007 samtykt at gera broyting í býarskipanini og byggisamtyktini fyri Leirvíkar Kommunu.

Broytingin er løgd fram til almenna eftirskoðan í vanligu upplatingartíðum frá 14. januar til 14. februar 2008.

Broytingin fevnir um økið við Bólagerði, ið er lagt út til bústaðarøki B, sum verður broytt til ídnaðarøki C.

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot skulu skrivliga verða kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 17. apríl 2008.

**Leirvíkar Kommuna**
Postboks 42 · 520 Leirvik